# Handilslærlingur

## Vit sóknast eftir lærlingi til HVS deildina hjá P/F Mariu Poulsen, Smyrilsvegur 8

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

**Førleikakrøv:**
FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

**Vit vænta at tú ert:**
Røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk. Harafturat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnuna, men hettar er eingin treyt.

Seinasta freist at senda umsókn við prógvum er 31. oktober 2010.

Eru spurningar, eru tygum altíð vælkomin at ringja á tel 31 20 00 – Símun Askham.

**pf Maria Poulsen**
Box 182 · FO-110 Tórshavn

STARVSLÝSING




## Eftirlitsfólk

Heilsufrøðiliga starvsstovan søkir eftirlitsfólk.
Umsóknarfreistin er 20. oktober 2010.

Meira fæst at vita á www.hfs.fo

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

# Bindimaskinutreff

**5. og 6. novembur verður bindimaskinutreff í Glæmuni í Kvívík**

**Tilmelding á tlf 227701**

**Bygdarfelagið Glæman**

TAKS

Vit sóknast eftir einum

# VERKÆTLANARLEIÐARA

**TAKS arbeiðir við at skipa sítt virksemi í verkætlanir, og tørvar enn ein dugnaligan verkætlanarleiðara**

Nýggi verkætlanarleiðarin verður partur av KT-deildini. KT-deildin mennir og røkir KT-fakskipanirnar hjá stovninum. Eisini tryggjar deildin, at TAKS tøkniliga erført fyri at umsita allar leypandi broytingar í landsins skatta- og avgjaldslógum og kunngerðum. Á KT- deildini starvast í dag fýra fólk umframt leiðaran.

**Uppgávurnar hjá verkætlanarleiðaranum verða m.a.:**
- At menna virksemi hjá stovninum til at verða stýrt eftir einum verkætlanarleisti
- At betra arbeiðsgongdirnar á stovninum
- At leiða ymsar KT- verkætlanir
- At samskipa samstarvið millum ymsar áhugabólkar, í samband við menning og íverksetan av KT-skipanum.

Starvið sum verkætlanarleiðari á KT-deildini setur høg krøv um kunnleika og eldhuga.

Umsøkjarar til starvið mugu hava útbúgving antin á bachelor ella kandidat støði. Holl vitan um kunningartøkni er neyðug. Passandi útbúgving er t.d. HD ella Cand. Merc. Dat., men eisini umsøkjarar við øðrum útbúgvingum kunnu søkja.

3-5 ár av starvsroyndum eru eitt krav, meðan royndir sum verkætlanarleiðari eru ein fyrimunur, men ikki ein treyt.

**Tann, ið søkir, skal:**
- Hava framúr góð evnir at samstarva og arbeiða í toymi
- Hava sera gott yvirblikk
- Duga væl at skipa arbeiði og at taka avgerðir
- Hava hug og hegni til at læra um ymisk fakøkir og arbeiðsgongdir.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Landsstýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Setanarøkið er TAKS, men fevnir eisini um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Ann Damgaard, KT-leiðara, á telefon 352600.

Send umsókn, CV, ummæli og avrit av prógvum til TAKS í seinasta lagi 21. oktober 2010, kl 12.00.

**TAKS**
Postsmoga 2151
FO-165 Argir
ella taks@taks.fo
*merkt: Verkætlanarleiðari*

...og einum

# LØGFRØÐINGI

**TAKS raðfestir løgfrøðina og setir tí enn ein løgfrøðing**

Fakligu avbjóðingarnar til løgfrøðingarnar á TAKS eru nógvar og ymiskar, og møguleikarnir fyri menning innan eitt løgfrøðisliga samansett øki eru góðir.

**Uppgávurnar hjá løgfrøðingunum eru m.a.:**
- At luttaka í lógarfyrireikandi arbeiði.
- At gera ummælir í kæru- og dómsmálum.
- At ráðgeva málsviðgerunum hjá TAKS í spurningum innan skatta-, avgjalds-, toll- og innkrevjingarøkið.
- At leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðandi ásetingar á skatta og- avgjaldsøkinum.

Løgfrøðingarnir leggja í stóran mun teirra arbeiði til rættis sjálvir, men eru eisini partar av ymiskum toymum, bæði við aðrar løgfrøðingar og onnur fakfólk á TAKS.

Á Lógardeildini á TAKS starvast í dag fimm fólk, av hesum eru tríggir løgfrøðingar.

Umsøkjarar til starvið skulu hava útbúgving sum løgfrøðingur (cand. jur.). Viðkomandi starvsroyndir eru ein fyrimunur, men ikki ein treyt. Lesandi, ið eru um at verða liðug við útbúgvingina, eisini vælkomin at søkja.

**Tann, ið søkir, skal:**
- Hava góð evni at samstarva.
- Hava hug at samskifta og vegleiða nógvum ymiskum fólkum.
- Vera fyrikomandi.
- Vera arbeiðssamur/som og nærlagdur/løgd.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Landsstýrið og Búskapar- og Løgfrøðisfelag Føroya.

Setanarøkið er TAKS, men fevnir eisini um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Jákup Eyðfinn Kjærbo, leiðara á Lógardeildini, á telefon 352600.

Send umsókn, CV, ummæli og avrit av prógvum til TAKS í seinasta lagi 21. oktober 2010, kl 12.00.

**TAKS**
Postsmoga 2151
FO-165 Argir
ella taks@taks.fo
*merkt: Løgfrøðingur*



Sosialurin 341800

TAKS er í støðugari menning, og miðvíst verður arbeitt fram ímóti, at TAKS verður ein framkomin stovnur, sum gongur á odda á øllum økjum.

www.taks.fo